## Keglast aftur um gass

Russland og Ukraina eru aftur farin at keglast um gass. Tann seinasta álvarssama gassósemjan millum londini var seinasta vetur og mundi evlt til stórt gasstrot í fleiri evropeiskum londum, sum fáa gass úr Russlandi ígjøgnum leiðingar í Ukraina. Nú er aftur vátt komið í reiðrið, tí Ukraina vil hava russar at rinda fyri flutningin, áðrenn gassið verður latið ígjøgnum leiðingarnar. Men í Moskva hevur leiðslan í gassfelagnum Gazprom svarað, at tað kemur ikki upp á tal, og eygleiðarar siga sambært Reuters, at tað stendur í botni partanna millum. Enn hevur Ukraina ikki hótt við beinleiðis tiltøkum.



## Vil hava virðiligan enda

Málið um tey 22 grønlendsku børnini, sum blivu tvingsilsflutt til Danmarkar í 1951, skal fáa ein virðiligan enda. Tað er høvuðsmálið hjá grønlendska landsstýrisformanninum, Kuupik Kleist, tá hann í næstu viku fer til Keypmannahavnar at hitta Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra. Landsstýrisformaðurin, sum hevur lýst málið sum "eina byrðu í tí søguliga ryggsekkinum", sigur við KNR, at loysnin kann vera ein donsk umbering, ein kanning ella ein fyrigeving. Umframt børnini skal fundurin eisini umrøða veðurlagsbroytingar og annað.

# Krabbi í Norðurlandahúsinum

**Í besta live8-stýli verður innsavning til Krabbameinsfelagið gjørd í heyst við undirhaldi og samrøðum. – Tá tiltakið er byrjað, fer hvør einasta króna til Krabbameinsfelagið, so vit fáa hjálp krabbameinssjúklingum, sigur Jákup N. Olsen, formaður í felagnum**

STUÐULSTILTAK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Tað er ikki endaliga greitt, júst hvørji nøvn verða á skránni á kvøldinum »Føroyar móti krabbameini«, men Føroya symfoniorkestur verður í hvussu so er við*

Symfoniorkestur, rokktónleikur, dansur, poppur og eitt sindur av skemti. Soleiðis verður ein partur av skránni til leygardagin 31. oktobur, tá savnað verður inn til Krabbameinsfelagið. Men hetta verður ikki tað einasta. Fólk, sum kenna krabbamein frá sær sjálvum og teimum tey hava nær, fara at greiða frá sjúkuni, og hvørja ávirkan hon hevur.

Tiltakið hevur ligið á lunnum í meira enn eitt ár, og tá tað fer av bakkastokki er tað Kringvarp Føroya, ið leggur kraftina í, fyri at senda beinleiðis frá átakinum, bæði í útvarpi og sjónvarpi.

Tað er í samband við, at Krabbameinsfelagið verður 30 ár, at skipað verður fyri hesum tiltakinum, sum skal veita stuðul til sjúklingar og gransking í krabbameini.

### Gamalt hugskot

Jákup N. Olsen, formaður í Krabbameinsfelagnum, er fegin um at hetta tiltakið endiliga verður veruleiki.

– Vit hava hugsa um eina tílíka innsavning í nógv ár, og endiliga sær tað út til at gerast veruleiki, at vit kunnu varpa ljós á krabbamein, samstundis sum vit vónandi fáa eitt sindur av peningi inn í hjálpargrunnin hjá okkum, tí vit fáa øgiliga avmarkaðan almennan stuðul, sigur hann.

Spurdur um tey hava ímyndað sær nakra ávísa upphædd, er hann avgjørdur.

– Hvør einasta króna kemur væl við, so vit vóna bara tað besta, sigur formaðurin í Krabbameinsfelagnum.

### Kostar at gera

Talan er um eitt rættiliga stórt kvøld í Norðurlandahúsinum, og tí kostar tað eisini fitt av peningi at fáa tiltakið upp á beinini.

– Vit fáa stuðul frá ymsum fyritøkum og Norðurlandahúsinum, men Krabbameinsfelagið rindar eisini sín part, greiðir Jákup N. Olsen frá.

Hann staðfestir tó, at tað ikki fer av innkomna peninginum at rinda útreiðslur av tiltakinum.

– Tá tiltakið er byrjað, fer hvør einasta króna til Krabbameinsfelagið, so vit fáa hjálp krabbameinssjúklingum, sigur hann.

Sjálva upphæddina fyri at fáa tiltakið upp á beinini sigur Jákup N. Olsen seg ikki kunna upplýsa, tí tað er so nógv sjálvboðið arbeiði, sum verður gjørt.

### Stór sending

Ein partur av gjaldinum hjá Krabbameinsfelagnum fer til Kringvarpið, sum ger fýra tímar longu innsavningina.

– Hetta er ein long beinleiðis sending, sum gevur okkum stórar avbjóðingar og nógvar royndir, sigur Solby Eliasen, programmleiðari í Kringvarpinum.

Hon leggur dent á, at hóast Krabbameinsfelagið hevur útreiðslur av sendingini, so gevur hetta ikki Kringvarpinum nakað avkast.

– Vit fáa vónandi gjørt eina góða sending, sum varpar ljós á krabbamein, sum helst øll í Føroyum hava uppliva tætt at lívinum, men tað kostar sjálvandi eina ávísa mongd av peningi at gera sendingina, sigur Solby Eliasen.

Hon vil tó ikki koma inn á upphæddina Kringvarpið fær fyri at gera sendingina.

### Fjølbroytt skrá

Tiltakið verður skipað sum innsavningar vit kenna úr øðrum londum, og tað er Kringvarpið, sum saman við Norðurlandahúsinum og Krabbameinsfelagnum, sum leggur skránna.

Enn er ikki alt klárt, men Føroya symfoniorkestur og nøkur onnur verða heilt víst við, samstundis sum arbeitt verður við onkrum skemti. Fýra vertir vera helst í sendingini, men tað er ikki fastlagt, hvørji hesi verða.

– Vit royna at fáa skránna upp á pláss, og tað verða altíð vit, sum avgera, hvat kemur við í sendingina, tí vit mugu taka nøkur journalistisk atlit, hóast onkrir partur av sendingini kunnu tykjast eitt sindur komersiellir, greiðir Solby Eliasen frá.

Hon staðfestir eisini, at hóast talan er um eitt sera álvarsamt evni, so er ikki ætlanin, at tað skal verða eitt syrgiligt kvøld.